Sigurð er tann fyrsti oljudoktarin

Sigurð í Jákupsstovu á Argjum hevur vart PhD-ritgerð innan kolvetnistøkni

Tann 19. desember 2002 vardi Sigurð í Jákupsstovu á Argjum, sonur Hjalta og Elin í Jákupsstovu, PhD-ritgerð á Danmarks Tekniske Universitet. Sigurð starvast hjá Atlantic Petroleum í Havn.

Ritgerðin er skrivað á enskum, og hevur heitið "Simulation of Gas Injection Processes". Vegleiðari til verkætlanina var Erling H. Stenby, professari á Danmarks Tekniske Universitet.

Í samband við PhD-verkætlanina hevur Sigurð í Jákupsstovu havt starvsstað á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Fígging til verkætlanina er fingin frá Granskingarráð Føroya og frá Nordisk Energiforsknings Programmer.

Umráðandi er at fáa so nógv sum gjørligt burtur úr oljuleiðum. Og PhD-ritgerðin hjá Sigurð í Jákupsstovu hevur atlit júst at hesum viðurskiftum. Ein háttur at økja um úrkomuna er at spræna vatn og/ella gass niður í kolvetnisgoymslur, soleiðis at trýstið í teimum verður varveitt.

Í summum førum kann fáast enn meira burturúr við at gagnnýta fysiska og kemiska skiftivirknaðin ímillum løgin, sum verður sprændur inn í goymsluna einumegin, og oljuna og goymslugrýtið hinumegin. Teldumyndlar verða brúktir til at fáa greiðu á hesum viðurskiftum. Teldumyndlarnir leggja upp fyri tí ávirkan, sum t.d. jarfrøðisligur ymiskleiki ("heterogeneity"), skiftivirknaður millum innsprænda løgin og oljuna, kapillarmegi og tyngdarmegin hava á streymar í kolvetnisgoymslum.

Í hesi PhD-verkætlanini hevur verið arbeitt við at betra lýsingina av fysiskum prosessum í teldumyndlum, har innsprændi løgurin blandast við kolvetni í goymsluni ("miscible displacement"). Her hevur serliga verið hugt eftir relativum permeabiliteti og hvussu hesin er ávirkaður av jarðfrøðisligum ymiskleika og broytingum av eginleikum hjá innsprænda løginum og oljuni. Partur av ritgerðini viðger og samanber eisini ymiskar hættir at rokna viskositet av kolvetni.

Bitin av ítrótti?

Við einum CanalDigital-haldi ert tú tryggjaður møguleikan at síggja ítrótt á hægsta stigi næstan alt samdøgrið.

Enskur, týskur og italskur fótbóltur úr bestu deildunum og steypakappingunum, tennis, hondbóltur, amerikanskur fótbóltur, kappríðing o.a.

Kom inn á gólvið og tosa við okkum um teir ymisku pakkamøguleikarnar hjá CanalDigital

10 ár á bylgjulongd RADIOHANDILIN 10 ár á bylgjulongd

v/ Echardt & Pola Persson Sp/f

Niels Finsensgøta 16 • 100 Tórshavn • Tel 318277 • www.radiohandilin.fo

†

Tað verður kunngjørt ætt og vinum,
at elskaða mamma, vermamma, omma,
langomma og systir okkara

Signhild Djurhuus
Kollafjørður

andaðist á ellisheiminum í Miðvági 8. januar,
95 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Kollafjarðar kirkju
leygardagin 11. januar kl. 13.00.

Familjunnar vegna
Børnini

Tey, ið vilja minnast Signhild, kunnu lata missiónshúsinum í Kollafirði eina peningagávu – konto í Føroya Sparikassa.

Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum øll, sum á ein hvønn hátt gleddu okkum í samband við silvurbrúðleyp okkara.

Gott nýggjár

Unn og Elfinn

Svimjihylurin í Gundadali 20 ár:

Ynskja sær baðiland í føðingardagsgávu

Jan Christiansen, borgarstjóri handar Hera á Lava Olsen, leiðara í Svimjihøllini 2 myndir gjørdar á grafiska verkstaðnum.

FØÐINGARDAGUR

Jan Müller
Jens K Vang

Fríggjamorgunin var samkoma í Svimjihøllini í Gundadali, nú tað eru 20 ár síðani, at havnafólk fingu sína fyrstu innilokaðu svimjihøll. Dagurin var 18. desember. Á samkomuni ynskti Jan Christiansen, borgarstjóri starvsfólki og brúkarum tilllukku. Hann helt fyri, at høllin hevði verið til stórt gagn fyri borgararnar allar í høvuðsstaðnum og vísti á, at hesi 20 árini hava 2,8 milliónir vitjanir verið í hylinum ella umleið 140.000 í meðal um árið. – Svimjihøllin í Gundadali er eitt gott stað hjá borgarunum at vitja. Tað síggja vit dagliga, har bæði nýføðingar, børn, vaksin og eldri fólk vitja høllina. Ja, fólk, sum eru mitt í fýrsunum svimja dagliga segði Jan Christiansen og helt, at tíðin kanska er komin hartil, at kommunan eigur at viðgera spurningin, nær ein nýggj svimjihøll skal byggjast í sambandi við nýggja skúlan í Hoyvíkshaganum.

Jan Christiansen vísti annars á, at vóru tað ikki undangongumenn, sum tóku stig til at byggja svimjihøllina fyri 20 árum síðani, var hon neyvan komin tá og nevndi hann m.a. Niels Debes, sum ein av teimum fremstu undangongumonnunum. Men mótstøðan móti byggingini var kortini so stór tá, at hvørki hann ella aðrir, sum gingu inn fyri projektinum, vórðu afturvaldir. – Tað var stórt spell fyri teir, men gott fyri okkum onnur í dag, at teir hildu fast.

Í mars mánaði í ár hevur Heri á Lava Olsen, sum í dag er dagligur leiðari í Svimjihøllini, verið 30 ár hjá Tórshavnar Kommunu, tvs. øll árini við tilknýti til svimjing. Tey fyrstu árini var hann lívbjargari í gamla svimjihylinum í Gundadali. Í 1985 tók hann við sum leiðari í nýggju høllini eftir Ivan Carlson. Heri sigur, at hetta hevur verið eitt gott arbeiðspláss og fegnast hann um, at svimjihøllin er so væl vitjað. Hann heldur tó ikki, at høllin í dag nøktar allan tørv. – Nógv svimja og her er oftani trongligt. Nú haldi eg, at man skal fara at hugsa um at fáa okkurt nýtt aftrat. Hann heldur at brúk er fyri einum baðilandi, og fer tað so eisini at taka trýstið av hylinum. Tað ber til at byggja vestureftir.

Heri Olsen sigur annars, at ein svimjihøll hevur ómetaliga stóran týdning fyri borgararnar. Hon kanska ger, at kommunulæknar og sjúkrahús hava færri vitjandi. So bæði sosialt og heilsuliga hevur henda høllin uttan iva havt stóran týdning. Fólk fara bæði glaðari og meira nøgd út úr svimjihylinum, hvørja ferð tey hava vitjað.

Jan Christiansen, borgarstjóri segði í síni heilsan, at hann hevði hoyrt um uppskotið hjá Hera og metti hann hetta at vera skilagott. Men tað vóru so bert tankar enn og varð einki klárt á tekniborðinum í so máta og heldur ikki á tí fíggjarliga borðinum sum so. Hann metti, at hetta hugskotið lá nakað úti í framtíðini.

Leiðarin í Svimjihøllini fekk eisini gávu frá Sosialinum, eina flotta reportasju úr hitarúminum í glasi og rammu

Klænari restina av lívinum!

harmoni

· Et teg mettan
· Óneyðugt at telja kaloriur
· Betri heilsa og vælvera
· Væl skjalprógvað skrá

Óbindandi upplýsingarfundir:

Hotel Hafnia
13.01.03 kl.19.00

Klaksvíkar Sjómansheim
14.01.03 kl.19.00

Mentunarhúsið í Fuglafirði
15.01.03 kl.19.00

Hotel Vágar
16.01.03 kl.19.00

Fyri meira kunning:
Ása Joensen 31 26 70 — Kaja Toftegaard 44 44 29, fax 22 02 59
Karin Olsen 45 63 56 — Álvur Joensen 44 10 75
Best eftir kl. 18.00

takk fyri dansin...

Vit hjá Restorff eru errin og fegin um ta góðu undirtøku sum bryggjaríið fekk í farna ári, framleiðsla okkara økist við 50 %
Vit hava sum fræegast royni at marknaðarført okkum við góðari kundatænastu, nýggju ølslagunum MUNGÁT og VARGI sum gleða allar øl-elskandi føroyingar og so hava vit sjálvandi heimsins besta sodavatn.



Vit eru 47.217 føroyingar ímóti 400 milliónum EU borgarum.
Latum okkum tí standa saman um føroyskar framleiðslur og alt sum er føroyskt.

Restorffs
tá tú hevur ambitiónir